# Ísland lækkar rentuna

Íslendski tjóðbankin, Seðlabankinn, hevur eitt sindur óvæntað lækka rentuna í dag úr 10,0% niður í 6,5%. Sambært Bloomberg News høvdu tríggir av teimum fýra búskaparfræðingunum, sum tíðindastovan hevur spurt, væntað óbroytta rentu, meðan hin eini hevði spátt eina lækkan niður í 9,5%, skrivar boersen.dk



# Maður handtikin í Maria-málinum

Danska løgreglan hevur nú ein illtonktan í sonevnda Maria-málinum. Tað var nýggjársnátt, at 20 ára gamla Maria Møller Christensen varð myrd eftir eina veitslu. Løgreglan hevði í fleiri vikur ein mann í varðhaldi, illtonktan fyri drápið, men tað vísti seg, at hesin var púra ósekur. Nú er so ein 48 ára gamal maður handtikin, eftir at dnaroyndir hava víst, at hann hevur verið í sambandi við Mariu, skrivar ekstrabladet.dk






*Nýbygningurin hjá gøtumonnum er 81,6 metrar langur og 16,6 metrar breiður*

# 14 metrar longri

**Nú er dagurin ásettur, tá nýggja skipið hjá gøtumonnum, Tróndur í Gøtu, alment verður navngivin á Karstensens Skibsværft í Skagen**

NÝBYGNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Navngevingin fer fram við bryggjuna á skipasmiðjuni leygardagin hin 6. februar klokkan 14. Síðan verður døgurði fyri innbodnum á Color-hotellinum í Skagen.

Tað er felagið Hvamm í Gøtu, sum Varðin eigur, ið letur skipið smíða. Nýggja skipið kemur í flotan fyri gamla Trónd í Gøtu, sum er seldur.

Ætlanin hevur verið, at nýbygningurin skuldi gera tekniska royndartúrin undan navngevingini, men nú er hetta broytt, soleiðis at royndartúrurin verður eftir navngevingina.

Nógvur kuldi og kavi í Danmark hava seinkað málaraarbeiðnum av skipinum.

Sambært ætlanini hjá gøtumonnum, loysir flaggskipið í Skagen nakrar dagar eftir miðan februar.

Nýggi Tróndur í Gøtu verður 81,6 metrar langur og 16,6 metrar breiður og fer at lasta eini 2700 tons.

Hóast nýbygningurin er heilar 14 metrar longri og stívliga tveir metrar breiðari enn gamli Tróndur í Gøtu, lasta skipini umleið tað sama, men nýggja skipið fer við síni støðd at bera lastina nógv betri.

Sáttmálaprísurin fyri Trónd í Gøtu liggur um stívliga 230 miljónir krónur, men við ymiskum, sum kemur aftrat, eitt nú útgerð og reiðskapi, fer kostnaðurin helst at tátta í einar 250 miljónir krónur.

## Kunning uttanlands

Í sínum svari til spurningin hjá Kára P. Højgaard um, hvat landsstýrismaðurin hevur gjørt fyri at kunna um burðardygga fiskiveiði, vísti Jacob Vestergaard á, at hann saman við umsitingini hevur greitt bretskum tingfólkum, skotska fiskimálaráðharranum og ES-kommiserinum frá okkara fiskidagaskipan, eins og umsitingin samskiftir við vinnuna um Vinnuhúsið um spurningin.

Landsstýrismaðurin ásannaði kortini, at einki beinleiðis felags átak er gjørt í hesum sambandi.

– Men tað er einki til hindurs fyri, at vinnan brúkar tilfar og kunning okkara í átøkum við tí fyri eyga at selja føroyskan fisk, legði hann aftrat.

## Ábyrgd hjá vinnu

Jacob Vestergaard vísti á, at tað er lættari at samanbera veiðu og kvotu í eini kvotaskipan, enn tað er at síggja og skilja, hvussu fiskidagaskipanin virkar.

Hann endurtók, at her liggur ein avbjóðing hjá okkara vinnu, sum vinnan helst skal raðfesta hægri í tíðum sum koma.

– Tað er regluligt samskifti millum vinnu og myndugleika, men fyrstu stigini til marknaðarføring av føroyskum fiski eigur vinnan at taka, segði landsstýrismaðurin, Jacob Vestergaard.

# Treytað frádøming og tvey klipp í kortið




**Løgreglan skrivaði 14 frágreiðingar og gav 6 átalur, tá ferðslukanningar vórðu gjørdar í Norðskálatunlinum mánadagin**

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Millum klokkan 17 og 18 mánadagin gjørdi løgreglan kanningar í Norðskálatunlinum, og teir høvdu eisini ferðmátaran við sær.

Einir 50 bilar vórðu steðgaðir, og burtur úr hesum skrivaði løgreglan tilsamans 14 frágreiðingar og gav 6 átalur.

Sjey frágreiðingar vórðu skrivaðar fyri ov nógva ferð.

Tann eini bilførarin koyrdi 116 kilometrar um tíman, og hesin kemur undir treytaða frádøming av koyrikortinum.

Tveir aðrir bilførarar koyrdu ávikavist 107 og 109 kilometrar um tíman, og fyri hetta brot fáa teir klipp í koyrikortið.

Sjey bilførarar høvdu ikki bilar sínar í lagi, høvdu gloymt trygdarbeltið ella høvdu ikki koyrikortið uppi á sær.

Minsta bótin fyri einstøk brot á ferðslureglurnar er 500 krónur, men koyrir tú ikki í trygdarbelti og heldur ikki hevur koyrikortið uppi á tær, er sektin 1000 krónur.